## Trý tiltøk hjá Norrønafelagnum í Leirvík

**Leirvík:** Norrøna Felagið í Leirvík fer hetta hálvárið at skipa fyri trimum ymiskum tiltøkum.

Í mars mánaði verður fyrilestur í skúlanum. Í mai verður farið yvir á Blankaskála og í juni verður farið ein gongutúr niðan á Vatnhamar. Í sambandi við henda túr fara staðkøn fólk at greiða frá.

Eisini er røða og felagssangur á skránni. Nærri verður greitt frá hesum seinni.

Øll eru vælkomin til fyrilesturin týskvøldið 9. mars kl. 20.00 í skúlanum, har Steffan Stumann Hansen, landsfornfrøðingur, fer at greiða frá:

»Toftanesi og Føroya elstu søgu.«

Hann fer at greiða frá útgrevstrinum á Toftanesi í 1980-árunum og tí altjóða týdningi, hann hevur havt. Somuleiðis umrøður hann byggisiðin í víkingaøld í Føroyum og ber hann saman eitt nú vð Hetland.

Umframt hetta verða nýfunnu krossarnir á Toftanesi sýndir fram og umrøtt verður, hvønn týdning, teir hava fyri spurningin, um nær kristindómurin kom til Føroya.

Skaale, og við seinna sita Jóhan Hendrik W. Poulsen og Malla Dam. Bjørt Samuelsen verður orðstýrari. Eisini verður tónleikur á skránni. At enda er ætlanin at hava kjak, har fundarfólkið eisini kann siga sína hugsan.

## »Sleeping around« í SMS

**Tórshavn:** Í dag kl 13 verða brot úr leikinum »Sleeping around« spæld á Torginum í SMS.

Leikurin hevur longu nú – góða viku undan frumframførsluna, fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum, orsakað av sínum ógvusliga og til tíðir grova málburði. Tað er Bárður Persson, sjónleikari, sum leikstjórnar teimum 6 ungfólkunum. Hann sigur, at brotini, sum verða spæld á Torginum ikki eru millum tey ógvusligu.

– Vit framførdu somu brot síðsta leygardag, og eg haldi – og havi hoyrt – at fólk tóku sera væl ímóti leikinum, sigur Báður Persson.

Hann viðgongur samstundis, at leikurin kann tykjast ógvusligur, hvat viðvíkur málburði og leikgongd. Men tað er ein góður leikur, sum ungfólkini longu nú, væl áðrenn frumframførsluna, hava tikið til sín, og uttan iva fara at framføra væl.

## Rástevna um føroyska málið

**Tórshavn:** Føroyska málnevndin og Móðurmálslærarafelag Føroya skipa fyri málráðstevnu 19. mars í Norðurlandahúsinum, har ætlanin er at viðgera støðuna hjá føroyska málinum í samfelagnum. Eitt endamál við stevnuni er at fáa kjak í lag, um vit eiga at fara undir at orða ein almennan føroyskan málpolitikk. Stevnan er almenn, og tað er ikki neyðugt at tekna seg frammanundan.

Tríggir røðarar verða: Niels Davidsen-Nielsen, professari við Handilsháskúlan í Keypmannahavn, sum eisini er formaður í Dansk Sprognævn, Björn Melander, lektari við Institutionen för nordiska språk á Uppsala Universitet, og Jógvan í Lon Jacobsen, adjunktur á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum og formaður í føroysku málnevndini.

Eisini verða tvey smá pallborð, har tvey fólk við ymiskum sjónarmiðum fara at skifta orð um eitt ávíst evni. Við fyrra pallborðið sita Karin Jóhanna Knudsen og Jóannes

## Fyrisitingin skal til Hovs

**Suðuroy:** Granskingardepilin fyri Økismenning hevur spurt suðuroyingar, hvar kommunala fyrisitingin skal verða, um kommunurnar í Suðuroynni verða lagdar saman.

40 prosent av teimum, sum vórðu spurd, vildu hava fyrisitingina at liggja í Hovi. Tá ið tunnilin millum Øravík og Hov verður liðugur, verður tað lutfalsliga stutt og lætt hjá øllum suðuroyingum at koma til Hovs, og tað hevur helst ávirkað svarini.

13 prosent hildu, at kommunuskrivstovan skuldi verða í Vági, og somuleiðis 13 prosent vildu hava hana á Tvøroyri.

Stórur munur var á, hvar fólkið í teimum ymsu kommunum vildu hava kommunufyrisitingina at liggja. Minsta undirtøkan fyri Hovi var at finna í Vági.




*At barnagarðarnir lata aftur í summarfrítíðini hevur við sær, at fólk ikki sjálvi kunnu gera av, nær tey fara í feriu. Hetta kemur ikki væl við hjá øllum, serstakliga ikki hjá teimum, sum fyrr hava havt tey framíhjárættindini at barnansingin hevði opið alt árið*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Frí at taka frí tá tað hóvar

**Tað kemur dátt við hjá fleiri foreldrum, at Barnagarðurin á Mýrunum í Runavík letur aftur í summarfrítíðini; tey høvdu roknað við stovnurin hevði opið eins og tvey undanfarnu árini**

BARNAANSING

*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Herfyri fingu foreldur at børnum, sum ganga í barnagarðinum á Mýrunum í Runavík skriv um, at stovnurin vegna sparingar letur aftur í summar.

Seinastu tvey árini hevur barnagarðurin, sum tann einasti, nevniliga havt opið í summarfrítíðini. Men tá kallaðist stovnurin Kongshavnar Barnagarður og var sjálvsognarstovnur.

Nú er stovnurin kommunalur og má fylgja tilboðunum hjá kommununi fyri barnaansing.

At barnagarðarnir lata aftur í summarfrítíðini hevur við sær, at fólk ikki sjálvi kunnu gera av, nær tey fara í feriu. Hetta kemur sjálvsagt ikki væl við hjá øllum.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri sigur, at býráðið kannar nú, um nakað kann gerast, soleiðis, at stovnarnir sleppa undan at lata aftur.

Hann sigur, at kommunan hevur skyldu til at veita øllum borgararum somu tænastu, tí ber ikki ber til, at bara ein stovnur hevur opið um summarið.

– Um hesin stovnurin skal hava opið, eins og seinastu tvey árini, má sama tilboð veitast til hinar stovnarnar hjá kommununi, sigur hann.

Borgarstjórin vísir á, at ein víðkað tænasta telur onkustaðni, og tað kemur at kosta kommununi meira pening at lata allar tríggjar stovnarnar hava opið alt árið.

– Men vit hava fingið nógvar reaktiónir frá fólki, og hyggja nú positivt uppá, um og hvussu hetta kann loysast, sigur hann.

Fríða Lómstein, leiðari á barnagarðinum á Mýrunum, sigur, at tey royna leggja summarsteðgin eina tíð, sum passar flestu foreldrunum. Hon skilir væl trupulleikan hjá foreldrunum, men sigur, at fyri stovnin er tað ein lætti at lata aftur í summarfrítíðini.

– Námsfrøðiliga er tað eisini best at steingja, tí skulu vit hava opið í summarfrítíðini, er neyðugt at leggja stovur saman og taka nýgg fólk inn. Tað er ikki gott fyri tey børn, sum illa tola broytingar, sigur hon.

Í Runavíkar kommunu eru 3 ansingartilboð við plássi fyri útvið 190 børnum.

# Kvinnukórsangur úr Klaksvík

**Um hálvan mars eru tríggjar konsertir á skránni hjá Suð**

KONSERT

– Tann fyrsta verður í Gøtu Kirkju mánakvøldið 15. mars kl. 19:30. Tann næsta í Kommunuskúlanum í Tórshavn mikukvøldið 17. mars kl. 20:00, og tann seinasta verður í Ósáskúlanum í Klaksvík hóskvøldið 18. mars kl. 19:00.

Í des. 2001 byrjaðu nakrar kvinnur at syngja saman til einstøk høvi í Klaksvík. Men í sept. 2002 byrjaðu tær so at venja regluliga undir leiðslu av Steinvør Fonn, og tær hava sungið síðani. Í dag eru 16 sangfuglar í Suð. Fleiri av teimum hava drúgvar royndir innan sang og kanska serliga kórsang. - Navnið kemur av orðinum "veingjasuð".



Skráin hjá Suð er rættiliga fjølbroytt. Tær syngja bæði kendar sálmar, og sangir, klassisk stykki og sangir úr sangleikinum "The Sound of Music". T.d. fara tær at syngja 4 satsir úr "Gloria" hjá Vivaldi, har ein satsur er ein duett, sum Gunvá við Keldu og Steinvør Fonn fara at syngja, ein úr "Elias" hjá Mendelssohn, ein úr "Requiem'inum" hjá Mozart, "Gott ist mein Hirt" hjá Schubert og annað. Tær fara eisini at royna seg við at syngja meir nútímans tónleik. Á klassiska økinum fara tær at syngja kendu og vøkru bønina hjá Fransi av Assisi, sum danin Niels La Cour (f. 1944-) hevur útsett til kvinnukór. Síðani fara tær eisini at royna seg við tí kenda swing sanginum "Don't Get Around Much Anymore" hjá Duke Ellington og Bob Russell. Og at enda syngja tær nøkur løg úr kenda sangleikinum "The Sound of Music" hjá Rodgers og Hammerstein. Jóhannes Andreasen hevur klaverfylgispælið til nøkur av stykkjunum og til "The Sound of Music", meðan restin er "a capella", tað er, at tær syngja uttan nakað ljóðføri.

Tær hava sungið til fleiri konsertir, nakrar matiné'ir, og nógv onnur tiltøk. Konsertirnar vera umleið ein tíma hvør.



# Fáa góð úrslit undir vánaligum umstøðum

**Í morgin fyllir Tvøroyrar Svimjifelag 40 ár og tað verður hátíðarhildið við almennari veitslu seinni í mánaðinum**

RUNDUR FØÐINGARDAGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Suðuroy:** Í morgin er rundur føðingardagur í Suðuroy. Tað er Tvøroyrar Svimjifelag, sum fyllir 40 ár 7. mars.

Sostatt eru tað nú 40 ár síðani, at nøkur hugagóð fólk á Tvøroyri savnaðist at stovna Tvøroyrar Svimjifelag.

Fyrsti formaðurin í felagnum var Birgit Hestoy og serliga fyri hana man hetta hava verið ein heppin løta, tí júst sonur hennara, Jón, gjørdust seinni stinnasti svimjari, felagið hevur fostrað og hann vann ein hóp av meistaraskapum, bæði føroysk og donsk meistaraskap, umframt at hann setti átta donsk met.

Yvirhøvur má sigast, at tað hevur eydnast Tvøroyrar Svimjifelag at ala upp góðar svimjarar og í løtuni hevur felagið ikki færri enn 10 svimjarar á landsliðum. Átta av teimum yngstu landsliðsevnunum hjá felagnum fara seinni í mánaðinum til Danmarkar við landsliðnum at vera við í Køge Open kappingini.

Men tað verður eisini gjørt nógv fyri at fáa góð úrslit, tí felagið ger eitt stórt ungdómsarbeiði, siga tey bæði Palli Eysturberg, formaður og Anita Farstad, skrivari í felagnum.

Og at gera gott ungdómsarbeiði, setir heilt serlig krøv til tey á Tvøroyri, tí ikki hava tey góðar umstøður at venja undir.

Einasti hylurin, sum tey hava, er tann í skúlanum og hann er bæði ein tann minsti og ein tann elsti í landinum.

At hann er so gamal, er eisini farin at merkjast á honum, tí hann er stongdur í heilum, tí hann krevur ábøtur.

Sostatt eru umstøðurnar at venja langt frá tær bestu, men kortini verður drivið á so nógv, sum gjørligt at kalla hvønn einasta dag.

Somuleiðis dylja tey heldur ikki fyri, at ein nýggjur hylur stendur ovast á ynskilistanum, men tað er eitt ódnartak.

Tað eru næstan bara børn og ung av Tvøroyri og nøkur úr Hvalba sum svmija í felagnum, men tey siga, at børn og ung úr øðrum bygdum eru eisini hjartaliga vælkomin í felagið.

Og so leggja tey afturat, at tað er onki aldursmark fyri at koma at svimja og teir yngstu svimjararnir eru ikki meiri enn tvey ár.

### 50 svimjarar

Í løtuni eru einir 50 virknir svimjarar í felagnum, umframt teir limir, sum ikki svimja so nógv.

Venjarar hava tey eisini at taka sær av teimum. Regitze Johannesen er høvuðsvenjari, men hon fær nógva hjálp frá Ruth Millum Garðarnar, umframt frá Katrinu og Karin Kristinu Eysturberg og øðrum.

– Men tað skal eisini leggjast afturat, at umframt hesi, eru tað nógv onnur, sum rætta eina hjálpandi hond, tá ið á stendur, ikki minst foreldrini og tað er ongin sum sigur nei, tá ið tey vera biðin til nakað. Í so máta er Tvøroyrar Svimjifelag eitt gott ov livandi felag, siga Palli Eysturberg og Anita Farstad.

Men uttan stuðul, ber onki til. Og tey bæði siga, at hóast hylurin er vánaligur, halda tey, at tey fáa góðan stuðul og stórt beinasemi frá Tvøroyrar Kommunu.

Men eisini frá Suðuroyar Sparikassa, frá trolaranum Steintór í Hvalba og frá Oddmari Thomsen, sum hevur Statoil, hava tey fingið dyggan stuðul.

Føðingardagurin verður hildin við almennari veitslu í høllini í Trongisvági leygarkvøldið 20. mars. Veitslan kostar 200 krónur og atgongumerki eru at fáa í Statoil og í Tangabúðini.

Hinvegin verður aðalfundur felagsins í TB-húsinum mánakvøldið 15. mars klokkan 20.

Í nevndini í Tvøroyrar Svimjifelag eru Palli Eysturberg, formaður, Poul Poulsen, næstformaður, Solfríð Vang, kassameistari, Anita Farstad, skrivari og Emilia Olsen, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Rúni Tummasarson og Sonja Hansen.



*Síðsta summar vóru tey í Tvøroyrar Svimjifelag eina stórfingja ferð í Hetlandi, har ikki færri enn 113 fólk vóru við*




# Stuðul frá FITUR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarvi millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.

Stuðul verður veittur innan hesi øki:

Ferðavinnuútbúgving

Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"

Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.

Samstarv millum flutningsfeløg

Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:

- Ítróttafeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Mentunarfeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald

Umsóknir skulu stílast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

ella

**FITUR**
**c/o Ferðamálsráð Íslands**
**Lækjargata 3**
**IS-101 Reykjavík, Ísland**

*Seinasta freist at søkja er 15. mars 2004.*